# Hernaðarkanning hevur skund

*Líkt er til, at myndugleikarnir í Russlandi eru í ferð við at lata hurðarnar aftur til sínar skjalagoymslur. Tí hava skjalrannsóknirnar í Eysturevropa, sum skulu lýsa leiklut Føroya undir kalda krígnum, skund, upplýsir løgmansskrivstovar*

DÁNJAL HØJGAARD

Tá Sovjettsamveldið skrædnaði og fór í søguna, vóru skjalagoymslurnar latnar upp fyri søgugranskarum og øðrum, sum høvdu áhuga at grópa í sovjettisku fortíðini.

Men ábendingar eru um, at russisku myndugleikarnir eru farnir at tátta í aftur, so at møguleikarnir fyri skjalainnliti verða skerdir í komandi tíðum, sigur Sigmund Isfeld, fulltrúi á løgmansskrivstovuni. Tískil hevur tað skund at fáa kanningina í eysturevropa setta í verk, sigur fulltrúin

Fyrsta stigið verður at gera ein arbeiðssetning fyri kanningina, sum verður eitt framhald av arbeiðinum við Svørturbók. Og samstundis skal gerast eitt tilmæli til løgmann um, hvussu tað er skilabest at skipa tað framhaldandi kanningararbeiðið.

Hernaðarkanningin fer hesaferð at liggja beinleiðis undir løgmansskrivstovuni. Tær rannsóknir, sum hava verið gjørdar higartil, vóru skipaðar undir einum serligum stýrisbólki. Men hesin bólkur virkar ikki longur.

Løgtingið hevur í ár játtað 400.000 krónur til skjalrannsóknir í eysturevropa. Kanningarnar skulu royna at lýsa, hvønn týdning Føroyar høvdu í sovjettiskum uttanríkis- og trygdarpolitikki undir kalda krígnum, so at tað fæst ein meira fullfíggjað mynd av søgu Føroya undir kalda krígnum.



*20 limir í íslenskum ellismotorsúkklufelag komu í gjár til Føroya at halda aðalfund felagsins* **Mynd: Jens Kr. Vang**

# Íslendskar ellissúkklur aðalfund í Føroyum

20 íslendingar á ellismotorsúkklum komu til Føroyar við Norrönu í gjár. Ørindi teirra eru at halda aðalfundin hjá felag teirra í Føroyum.

Tað er vanligt hjá hesum felag at fara út at ferðast við aðalfundinum, og hesaferð hava tey gjøgnum felagið Føroya Ellisakfør skipað fyri fundinum í Føroyum.

Íslendsku gestirnir fara avstaðaftur við Norrönu til Íslands mikudagin.

# Løgmaður stuðlar fakfeløgunum

*Løgmaður hevur tikið upp málið um samsýning fyri nevndararbeiði hjá tí almenna*

EIRIKUR LINDENSKOV

Í skrivi til Starvsmannafelagið hevur løgmaður boðað frá, at hann er samdur við fakfeløgunum í, at greiðar reglur mugu vera fyri, hvussu nevndararbeiði hjá tí almenna verður samsýnt. Hetta verður gjørt í sambandi við, at arbeiðsbólkurin, ið skal gera uppskot um barnsburðargrunn ikki fær virkað, tí at hesi viðurskifti ikki eru í lagi.

Løgmaður sigur, at hann í hesum sambandi hevur havt fund við Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharra um málið. Á hesum fundi varð gjørt av, at Fíggjarmálastýrið skuldi lýsa viðurskiftini nærri, soleiðis at ein avgerð kann takast um, hvussu nevndararbeiði hjá tí alemenna verður samsýnt. Løgmaður roknar tí við, at viðurskiftini skjótt verða fingin í eina fasta legu.

Gott høvi at leggja av við
LEGG-AV PAKKANUM

ið fæst "Altjóða roykfría dagin" mikudagin tann 31.05.00
á Tjaldurs Apotek Tórshavn, Tjaldurs Apotek Runavík,
Norðoyar Apotek og Suðuroyar Apotek

Pakkin kostar 25,- kr., og fæst á øllum apotekum tann 31.05.00.
Tað er Tubbaksráðið, saman við Apotekinum, ið skipar fyri hesum tiltakinum. **Endamálið við tiltakinum, er at geva roykjarum eitt gott høvi at leggja av at roykja.**







Sosialurin - 311820

Í legg-av pakkanum er:
- 1 pk. nikotin tyggigummi.
- 1 pk. odeomint bomm.
- 1 vegleiðing við nýtslu av nikotintyggigummi.
- 1 vegleiðing til hvussu ein kann leggja av.

Apotekið hevur saman við tubbaksráðnum eisini gjørt ein faldara sum týðuliga greiðir frá hvussu ein kann hjálpa sær sjálvum til at leggja av. Hesin faldari er í Legg-av Pakkanum, og fæst annars á Apotekunum krig landið.




Við at lata lepan inn á eitt av apotekunum, fært tú ein **LEGG-AV PAKKA.** Apotekið hevur pakka umleið 1000 pakkar til útflíggjan hendan dagin til tey, ið hava í hyggja at leggja av at roykja, **Altjóða roykfría dagin, mikudagin tann 31.05.00.**

Lat lepan inn á apotekið, og fá ein LEGG-AV PAKKA

Navn:

Bústaður:

ALMANNA- OG HEILSUMÁLASTÝRIÐ



# Koralbók til føroysku sálmabókina

*Í handlarnar eru komnar tvær bøkur, ið Føroyskt Kirkjumál hevur givið út. Onnur er Sálmaløg Føroya Kirkju, ið er koralbók, ið Knút Olsen og Zacharias Sørensen hava lagt til rættis. Hin Trúarjáttan føroysku fólkakirkjunnar, har Hans Jacob Joensen, bispur, hevur lagt týðingararbeiðið úr hondum*

DAGFINN OLSEN

Í bókabúðirnar eru komin tvey stórfingin bókaverk, ið forlagið Føroyskt Kirkjumál hevur givið út. Forlagið varð stovnað í tríatiárunum og hevur til endamáls at geva út bøkur við kirkjuligum endamáli.

Í samband við bókaútgávurnar var samkoma hósdagin, har bøkurnar vórðu lagdar fram. Onnur bókin er stórhending í sjálvum sær. Hon hevur verið longi á veg, men tað er eisini stórarbeiði, ið liggur aftanfyri.

Á heysti 1992 settust teir báðir Knút Olsen og Zacharias Sørensen at leggja til rættis lagasavn til alla sálmabókina og nu fyriliggur Sálmaløg Føroya Kirkju, eisini nevnd Koralbókin.

Bjarni Bæk, dómpróstur og harvið formaður fyri forlagnum Føroyskt Kirkjumál, segði í samband við bókaútgávurnar, at Knút Olsen og Zacharias Sørensen her hava framt rættiligt pionerarbeiði. Tørvur hevur verið á, tí áður hevur t.d. Den Danske Koralbog verið nýtt, umframt ymisk hefti, ið hava verið givin út og sum víst hevur verið til.

Í fororðinum siga Knút og Zacharias m.a., at tørvur hevur verið á lagasavnið til løgini í sálmabókini, ið kundi miðsavna føroyskan sálmasong og gera tað sjálvsagt og lættari at brúka føroysk sálmaløg. Teir hava kannað, hvussu slíkar bøkur eru lagdar tilrættis í øðrum londum og hava sett sær nakrar meginreglur. M.a. skulu øll løg, sum vanliga verða sungin í kirkjum okkara, vera í bókini, uppruna satsirnir skulu nýtast, um til ber, og øll nýtilig føroysk sálmaløg hava framíhjárætt.

Ymiskt hevur verið, hvussu hevur gingist at finna upprunaløg. Onktíð endaði leitingin í blindum.

Í bókini eru í alt 453 løg. Harav eru 93 føroysk. Gomul føroysk sálmaløg telja 36, tey yngru 56. Hans Jacob Højgaard eigur 16, Knút Olsen 11 og Sámal Petersen 5 løg. Í 236 førum er talan um sama stev. Tað merkir, at sama lag kann nýtast í fleiri førum.



*Í bókini Trúarjáttan føroysku fólkakirkjunnar hevur Hans Jacob Joensen týtt, og hann hevur millum annað rent seg í trupulleikan við, at okkum á føroyskum við hvørt vantar ymsik heiti*

Teir báðir hava ikki lagt seg eftir at verið nýskapandi, men hava lagt seg eftir at nýta tilfarið, ið verður nýtt kring landið.

Eitt, ið mangan hevur gjørt tað trupult at spælt føroysk sálmaløg er, at talan oftast hevur verið um kórsatsir og ikki nótar at leika urgu eftir, men við nýggju bókini er vunnið á hesum trupulleika hjá urguleikarum.

Knút og Zacharias hava fingið hjálp frá fólki og urguleikarum kring landið. Serliga hava teir hug at nevna Hera Eysturlíð, ið hevur hugt alt ígjøgnum og snøggað. Hans Erland í Brekkunum hevur bólkað eftir stevi og Oddvør Johansen spælt ígøgnum, tá talan hevur verið um at royndarsyngja.

Her hevur t.d. verið talan um, at roynt hevur verið at sett løgini einar tveir tónar niður, tí fólk ofta hava gramt seg um, at kirkjusongurin er ov høgur. Tað vísti seg tó, at løgini mátti setast ein til tveir tónar uppaftur, tí annars gjørdist ov lágt.

Bjarni Bæk legði á samkomuni hósdagin dent á, at eingin sigur, at Den Danske Koralbog nú skal leggjast burtur. Tað stendur øllum frítt at brúka nýggju bókina, ella ikki.

Hann nevndi eisini, at hóast teir nú hava havt evstamark í eini 2 ár, so er at fegnast um, at bókin kemur nú, ið tað verður hátíðarhildið, at fólk hava hildið guðstænastur í 1000 ár.

Í samband við nýggju koralbókina, er alt arbeiðið gjørt í Føroyum. Hon kom í bókabúðirnar nakað eftir páskir og er prentað í 800 eintøkum.

**Trúarjáttanir**

Umframt Koralbókina, so er onnur bók eisini komin frá Føroyskt Kirkjumál.

Talan er um bókina Trúarjáttan føroysku fólkakirkjunnar.

Hans Jacob Joensen, bispur, hevur latið týðingina úr hondum og hann sigur í formælinum, at óivað hava fleiri saknað, at tær skriftir, ið eru bindandi fyri trúgv og læru fólkakirkjunnar, ikki eru á føroyskum máli.

Í bókini eru tær sonevndu vanligu ella samkirkjuligu trúarjáttanirnar, Augsburgska trúarjáttanin og Lítla Katekismus hjá Dr, Martin Luther.

Hans Jacob Joensen takkar í formælinum Regini Dahl fyri loyvi at læna týðing faðir hansara, Jákup Dahl, av Ápostólsku trúarjáttanini og Lítlu Katekismus.

Bjarni Bæk segði í samband við bókaútgávuna, at dentur hevur verið lagdur á at fáa bókina út í ár. Talan er um guðstænastutekstir og hann helt eisini vera natúrligt, at kirkjan hevur sítt grundarlag á egnum máli.

Hans Jacob Joensen segði, at hetta er hansara fyrsta týðing og at ikki altíð er lætt at týða, tí okkum vantar ofta heiti á føroyskum. Sum vanligt er hjá kirkjuni, verður týtt úr frum- ella upprunamálunum.



*Hans Jacob Joensen, ið hevur týtt trúarjáttanir til føroysku fólkakirkjuna, Bjarni Bæk, formaður í forlagnum Føroyskt Kirkjumál, Knút Olsen, ið sjálvur annar hevur lagað til koralbókina, Marna Olsen, skrivstovukvinna, Zacharias Sørensen, koralbókin, og Svenning Tausen, ið hevur verið til hjálpar við rættlestri og øðrum* **Myndir: Dagfinn Olsen**



*Bjarni Bæk, dómpróstur, takkaði teimum báðum Knút Olsen og Zacharias Sørensen fyri arbeiðið, ið teir hava lagt í bókinia við sálmaløgum, og nevndi hetta satt pionerarbeiði*

NOKIA
GSM • NMT 450




Sosialurin - 311820

Δ DELTA
ELEKTRONIKTÆNASTAN
J. PATURSSONARGØTA 18
100 TÓRSHAVN
TEL. 318050 FAX. 320350